# Álop á linjudómari meldað til politiið



*— Í frágreiðingini finst dómarin ikki at nøkrum av teimum viðurskiftum, ið GÍ hevði ábyrgd av í sambandi við dystin, so tí kemur ikki upp á tal at revsa gøtumenn, sigur Karl Vidtfeldt, kappingarstjóri hjá FSF*

**Tilburðurin í Gøtu sunnudagin, tá ein áskoðari gjørdi seg inn á annan linjudómaran, er nú blivið politimál. Hvørki kappingarnevndin, fótbóltsdómarafelagið ella GÍ hava viðgjørt málið enn, men einki bendir á, at tað fær fylgjur fyri GÍ**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Í dystinum millum GÍ og B36 gjørdist rættiliga rokut síðsta hálva tíman ella so. Tá avtornaði, høvdu tríggir spælarar fingið reyða kortið — ein hjá GÍ og tveir hjá B36.

Men tað var ikki nóg mikið við hesum, tí tað kókaði eisini yvir hjá einum áskoðara, sum leyp niður av høgu girðingini vestan fyri vøllin og helt beina leið at øðrum linjudómaranum, sum hann so gjørdi seg inná.

Hvat er hent og ikki, so metti linjudómarin í øllum førum tilburðin so mikið álvarsligan, at hann hevur meldað hann til politiið.

Hetta er annar tilburðurin í ár, sum hevur verið hildin at vera so mikið álvarsligur, at hann er meldaður til politiið, og fótbóltsdómarafelagið fer í næstum at viðgera støðuna og at taka støðu til, hvussu limirnir í felagnum kunnu tryggjast betur, tá teir døma dystir hvørt vikuskifti frá tíðliga á vári og langt út á heystið.

— Vit vilja gera alt fyri at verja okkara limir, og tá tað — sum í hesum førinum — snýr seg um hendingar, ið liggja uttan fyri karmarnar hjá fótbóltssambandinum, mugu vit taka støðu til, hvussu hesi viðurskifti kunnu betrast, so tað kann vera trygt hjá okkum at døma, uttan at vandi skal vera fyri, at slíkt endurtekur seg, verður sagt frá fótbóltsdómarafelagnum.

Dómarin í dystinum skrivaði eftir dystin frágreiðing um tað, sum var hent, og henda frágreiðing skal nú viðgerast í kappingarnevndini hjá fótbóltssambandinum.

— Vit hava ikki enn havt nakran fund, og heldur ikki vænti eg, at vit gera nakað við málið, fyrr enn kappingin er liðug. Tá skulu vit endurmeta alla kappingina, og sjálvsagt verður hetta málið við í tí viðgerðini, sigur Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini.

— Í frágreiðingini finst dómarin ikki at nøkrum av teimum viðurskiftum, ið GÍ hevði ábyrgd av í sambandi við dystin, so tí kemur ikki upp á tal at revsa gøtumenn fyri tað, sum er hent. Vit mugu taka hetta sum ein einstakan tilburð, og so annars vóna, at slíkt ikki endurtekur seg.

### Ongar fylgjur fyri GÍ

Tað, at áskoðarin ikki var ein, sum í hesum førinum verður roknaður sum viðhaldsmaður hjá GÍ, ger allarhelst eisini sítt til, at málið ikki fær fylgjur fyri GÍ, sum annars hevði væntað, at ein bót fór at koma, nú talan var um dyst á heimavøllinum hjá felagnum í Gøtu:

— Vit gjørdu beinanvegin fótbóltssambandinum greitt, at skuldu vit fáa bót, vildu vit fáa hana sum skjótast, so vit kundu senda hana víðari til rætta viðkomandi, sigur Jógvan Gregersen, formaður í GÍ.

— Annars hava vit als ikki viðgjørt málið enn, men fara at taka tað upp, tá vit aftur hava fund í nevndini. Hvørja niðurstøðu vit tá koma til, dugi eg einki at siga um nú.

Sostatt bendir einki á, at nøkur viðgerð av bót ella øðrum fylgjum í fótbóltshøpi verður í málinum, sum tó verður tikið við í eftirmetingarnar allastaðni — bæði í kappingarnevndini, fótbóltsdómarafelagnum og GÍ.

Men av tí at tilburðurin sunnudagin er meldaður til politiið, verða helst einastu fylgjurnar tær, ið kunnu standast av teimum kanningum, politiið ger í málinum.

# Bulgaria varð tikið á bóli

**Føroysku kvinnuunglingarnir megnaðu javnleik ímóti vertunum í Bulgaria, sum avgjørt høvdu roknað við at vinna á heimavølli**

U-19 KVINNULANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Tað vóru fegnar gentur á U–19 landsliðnum, sum vit fyrrapartin í gjár høvdu í telefonini. Eftir fyrrapartsvenjingina sótu tær og hugnaðu sær í Varna, sum liggur eysturi við Svartahavið, og tað var ikki undur í, at lagið var gott. Í fyrrakvøldið megnaðu tær 1–1 ímóti bulgarsku vertunum.

– Bulgarsku genturnar vóru sera vónbrotnar eftir dystin. Tær høvdu avgjørt roknað við, at tær fóru at fáa øll stigini ímóti okkum, frætta vit úr Bulgaria.

Fyrstu løtuna sá tað eisini út til, at vertirnir skuldu vinna. Tær høvdu onkrar royndir ímóti føroyska málinum, men Randi Wardum bjargaði meistarliga. Dygst undan steðginum hendi so tað, sum ikki átti at komið fyri. Ein av bulgarsku spælarunum kom ímillum føroyskt uppspæl. Hon sneiddi framvið fleiri og skoraði til 1–0.

Men hóast tær høvdu fingið sum vátan vøtt bara ein minutt undan hvíldini, so reisti føroyska liðið seg.

– Vit høvdu leikliga yvirvág, og tað var uppiborið, at vit í hvussu so er megnaðu javnleik, heldur Álvur Hansen, venjari hjá U–19 landsliðnum.

Føroyska liðið javnaði til 1–1, tá tað restaði eitt korter. Eftir uppspæl í høgru sendi Elin Katrina Haraldsen ímóti málinum. Bólturin brast í stólpan, og Elsa Maria Simonsen var fyrst á returinum og beindi bóltinum í málið.

Føroyska liðið hevði eins nógva orku, sum mótstøðuliðið hevði. Síðstu løtuna var føroyska liðið um reppið at fáa mál, men málverjin bjargaði royndini frá Ásu á Neystabø.

### Koppaði rætta vegin

Undan fráferðini ásannaði Álvur Hansen, at júst hesin árgangurin kanska myndar tað besta liðið við størstu breiddini nakrantíð. Hann roknaði við, at tað fór at bera til at fáa stig í onkrum dystum, men hann kvíddi eitt sindur fyri, at tað skuldi ganga soleiðis, sum tað gjørdi í fjør, tá føroyska liðið í trimum tøttum dystum ikki megnaði at skora og fekk eitt stig eftir ein málleysan dyst og tvær ferðir 1–0 tap.

Men fyrsta royndin hesa ferð var góð. Føroysku genturnar megnaðu at spæla seg tilmøguleikar, og tær skoraðu eitt mál. Um fleiri mál og stig fara at koma til høldar fæst fyrsta vitanin um í kvøld, tá Føroyar skulu spæla ímóti Litavia. Sunnudagin skulu Føroyar spæla ímóti Onglandi, sum avgjørt er besta liðið í bólkinum.

Føroyska liðið var soleiðis mannað mikukvøldið: Randi Wardum, HB – Unn Kragesten, B36, Rósmari Haraldsen, B36, Petra Sjóstein, KÍ – Elin Katrina Haraldsen, AB, Asta Magnussen, liðformaður, AB, Elsa Maria Simonsen, KÍ, Kristina D. Simonsen, HB, Mary–Ann Isaksen, B68 (Heidi Hansen, B36, 70.) – Maibritt Olsen, B68, Ása á Neystabø, B36.

Á beinkinum vóru Jóhanna Ólavsdóttir, KÍ, Malan á Dunga, HB, Linda Weihe, HB, Maria Michelsen, AB, Ása Christiansen, B36, og Selma Dahl Erol, B36.



# Eysturoyar Bridgefelag føroyameistari

**Eysturoyingar fingu fjórða FM-sigurin fyri lið, tá kappast varð í Vági herfyri. Liðið vann allar sínar dystir, og endaði 19 stig framman fyri næsta liðið**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*



*Tað gjørdist liðið hjá eysturoyingum, sum varð tað drúgvasta, nú FM-kappingin varð hildin í Vági*

Eysturoyar Bridgefelag vann FM kappingina millum feløg suðuri í Vági seinasta vikuskifti. Sigurin hjá eysturingum má sigast vera avbera uppiborin, teir vunnu allar sínar dystir. Avgerðin fall í næstseinasta umfari, tá teir vunnu 21-9 á føroyameistarunum í fjør frá Bridgedeild Kaggans. Við á liðnum hjá Eysturoyar Bridgefelag leiktu Magni Jøkladal, Símin Lassaberg, Robert Langgaard og Eyðun Anthoniussen. Hetta er fjórða ferðin, at Eysturoyar Bridgefelag vinnur FM fyri feløg. Síðan kappingin um hetta ferðarsteypið byrjaði í 1994 hevur Bridgedeild Kaggans vunnið tvær ferðir, Vestmanna Bridgefelag, Nýggja Bridgefelag og Havnar Bridgefelag eina ferð í part.

### Úrslit

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bridgedeild Kaggans | - | Klaksvíkar Bridgefelag | 25 | 00 |
| Havnar Bridgefelag | - | Vágs Bridge- og Billiardfelag | 23 | 07 |
| Eysturoyar Bridgefelag | - | Nýggja Bridgefelag | 22 | 08 |
| Havnar Bridgefelag | - | Eysturoyar Bridgefelag | 10 | 20 |
| Nýggja Bridgefelag | - | Klaksvíkar Bridgefelag | 17 | 13 |
| Vágs Bridge- og Billiardfelag | - | Bridgedeild Kaggans | 15 | 15 |
| Bridgedeild Kaggans | - | Nýggja Bridgefelag | 21 | 09 |
| Eysturoyar Bridgefelag | - | Vágs Bridge- og Billiardfelag | 25 | 02 |
| Klaksvíkar Bridgefelag | - | Havnar Bridgefelag | 04 | 25 |
| Vágs Bridge- og Billiardfelag | - | Klaksvíkar Bridgefelag | 05 | 25 |
| Eysturoyar Bridgefelag | - | Bridgedeild Kaggans | 21 | 09 |
| Nýggja Bridgefelag | - | Havnar Bridgefelag | 04 | 25 |
| Bridgedeild Kaggans | - | Havnar Bridgefelag | 19 | 11 |
| Klaksvíkar Bridgefelag | - | Eysturoyar Bridgefelag | 05 | 25 |
| Vágs Bridge- og Billiardfelag | - | Nýggja Bridgefelag | 20 | 10 |

### Endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyar Bridgefelag | 113 |
| 2 | Havnar Bridgefelag | 94 |
| 3 | Bridgedeild Kaggans | 89 |
| 4 | Vágs Bridge- og Billiardfelag | 49 |
| 5 | Nýggja Bridgefelag | 48 |
| 6 | Klaksvíkar Bridgefelag | 47 |

### Bridge vinnur fram í Vági

Síðan kreppuárini í 90-unum, hevur bridgespælið verið mest sum útdeytt í Vági. Vágbingar hava ikki tikið lut í FM kappingum, og tey bæði gomlu traditiónsríku feløgini har suðuri eru farin fyri bakka.

Men nú er lív komið í aftur. Í gomla smiðjuni á Gørðum hava vágbingar innrættað høli, har eitt nýtt felag við navninum Vágs Bridge- og Billiardfelag í dag heldur til. FM kappingin fyri feløg var leikt í hesum stóru og prýðiligu hølum, og kunnu vit, sum komu norðanfjørs bara fegnast við vágbingum um hetta framstig fyri Suðuroynna á frítíðar- og mentanarøkinum. Sum altíð, var blíðskapurin stórur í Vági. Nevndin í nýggja felagnum við Peturi Winther á odda frøddist um at síggja so nógvar bridgespælarar aftur í Vági, og tey bóðu okkum siga øllum frá, at tey spæla bridge í Bridge- og Billiardhúsinum hvørt týskvøld frá kl. 19.00, har øll, sum hava hug at læra hetta spennandi spælið at kenna eru vælkomin inn á gólvið at spæla ella bara at forvitnast.

Fyri fyrstu ferð í 10 ár hava vágbingar meldað lið til opnu FM kappingina fyri lið, har tað fyrsta umfarið verður leikt í Klaksvík fyrsta vikuskifti í november.

## Uppiborin straffur

*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen, spøl frá EM*

Tað gerst alt meira vanligt millum bridgespælarar at melda aggressivt inn. Í hesum spælinum fekk lattviski leikarin lønina, hann hevði uppiborið, fyri eitt heldur nasadjarvt innmeld.

| | | |
|---|---|---|
| Nr.2 | Q1052 | |
| E/NS | 10963 | |
| | 963 | |
| | 76 | |
| A71 | | 986 |
| QJ8 | | AK7 |
| A52 | | KJ1087 |
| A1095 | | Q4 |
| | KJ4 | |
| | 542 | |
| | Q4 | |
| | KJ832 | |

| S | V | N | E |
|---|---|---|---|
| Gints Rubenis | Jóannes Mouritsen | Andrejs Milgravis | Heðin Mouritsen |
| - | - | - | 1ru |
| 2kl | pass* | pass | D |
| pass | pass | pass | |

Gott sæð av Jóannes her at nýta kravpass og straffdupla tað tunna innmeldið hjá Sunnan. Kontraktin varð sett tríggjar ferðir, og Heðin kundi skriva sær 800 inn.

Í hinum rúminum spældu EV 3ut við 9 stikkum, sum einans gav 400, og føroyska liðið skoraði 9 imp fyri spælið.

Dysturin endaði 25-5 til Føroyar, sum er størsti sigur nakrantíð hjá føroyskum bridgelandsliði í altjóða dysti.

# Vinnarin fekk ein veðr

**Sonevnda Veðrakappingin í leirdúgvu-skjóting fór fram leygardagin 21. september á skeetbreytini hjá Sunda Byrsufelag á Norðskála**

SKJÓTING
*tíðindaskriv*



*Sum tað sæst á myndini, so fekk vinnarin í Føroya Bjór kappingini ein veðr, men hesin var so nakað størri enn tann, sum vanliga verður settur í samband við bryggjaríðið í Klaksvík*

Føroya Bjór sponsorerar kappingina við einum veðri til vinnarin og 3 steypum, umframt at okkurt leskandi eisini var at fáa hjá luttakunum.

Við í kappingini vóru 24 mans, 15 úr Sunda Byrsufelag og 9 úr Byrsumúla í Havn.

Hesir 24 vórðu býttir upp í 4 bólkar uppá 6 mans, ið hvør skutu tvey umfør uppá 25 dúgvur. 12 teir bestu skutu síðani í tveimum bólkum eitt umfar uppá 25 dúgvur hvør.

Vinnari varð Marius Joensen úr Sunda Byrsufelag við 60 dúgvum av 75, nr. 2 varð Tórbjørn Hansen úr Sunda Byrsufelag við 58 dúgvum, nr. 3 varð Robert Hansen eisini úr Sunda Byrsufelag við 57 dúgvum. Tann besti havnamaðurin varð Regin Enghamar nr. 5 við 52 dúgvum.

Á myndini síggjast teir tríggir Tórbjørn, Marius og Robert við steypunum og vinnara-veðrinum, sum vá 74 pund.

### Bíða eftir boðunum

Ætlanin er at hava eina árliga FM-kapping, og síðani kanska at taka upp aftur landskappingarnar við Hetland annaðhvørt ár. Aðrar planir eru eisini fyri at víðka virksemið hjá feløgunum, men striltið gongur, tí Byrsumúli hevur ligið stilt í 9 ár og bíðað eftir grønum ljósi frá kommununi og friðingarmyndugleikum.

Hugsast kann heldur ikki um luttøku í Oyggjaleikunum, fyrrenn breytirnar hjá Byrsumúla eru klárar til nýtslu aftur. Tað er eisini ein spurningur, hvussu leingi Føroyar sleppa at luttaka í Oyggjaleikum, uttan at hava skjóting við sum ítróttagrein.

Lítið hevur annars verið at frætt frá skjóting tey seinnu árini, helst tí at tað bert er breytin við Norðskála, ið er tøk.

Breytirnar hjá Byrsumúla eru enn til viðgerðar hjá friðingar-myndugleikunum, men har er tó eingin avgerð fallin enn í drúgvu málsviðgerðini.